## Woods kostar sjónvarpspengar

Golf er ein av ítróttinum, sum heilt nógvir pengar eru í. Ikki minst takkað verið beinleiðis sjónvarpssendingunum. Men virðið á hesum tykist falla nógv, nú stjørnan, Tiger Woods, er fallin. Ótrúskapurin hjá Woods hevur fyribils sent stjørnuna úr ítróttini, og tað hevur fingið sjónvarpsstøðirnar at óttast fall í hyggjaratølunum. – Uttan Woods eru kappingarnar sum stórir filmar uttan nakrar stjørnur, sigur Bill Carrol, stjóri á NBC. NBC sendi seinasta vikuskifti frá Chevron Wolrd Challenge, men hyggjaratalið hesa ferð var 54 prosent lægri, enn tað áður hevur verið.



## Bíðaðu í 113 ár

Argentinska Banfield vann sunnudagin sítt fyrsta meistaraheiti í søguni hjá nú 113 ára gamla fótbóltsfelagnum. Á seinasta leikdegi tapti Banfield annars 2-0 móti Boca Juniors, men samstundis tapti Newell's Old Boys sín dyst, og so var klárt til stóru veitsluna hjá felagnum, sum varð stovnað í 1896 av enskum, skotskum og írskum tilflytarum.

### Neistin-StÍF 30-25 (12-12):

# Oddaliðið hevði yvirskotið

**Neistin tok stigini, tá teir leygardagin spældu heimadyst móti StÍF. Men tað tók sína tíð, áðrenn mótstøðan gav seg**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk



**Neistanum vantaði fleiri profilar hesaferð, men í samlaða úrslitinum bilti tað ikki stórvegis, tá nummar tvey á stigatalvuni varð sent heim við ongum**

Mynd: Álvur Haraldsen

Neistin stevnir við fullari ferð móti FM-finaluni í manshondbólti. Enn er kappingin bara hálvrunnin, men sigurin á StÍF bar við sær, at munurin niður til næsta liðið øktist upp í seks stig, og sum Neistin spælir í løtuni, er tað ein spurningur, um tað ber til hjá ikki bara einum men tveimum mótstøðuliðum at taka bláu menninar aftur.

Hesa ferð mátti oddaliðið enntá vera Heina Hanusarson, Jugoslav Djumic og Inga Olsen fyriuttan, men í endaligu støðuni bilti hetta einki.

Tað tók tó sína tíð, áðrenn StÍF gav seg. Neistin leyp avstað fyrstu minuttirnar, men tað var skjótt, at gestirnir fangaðu teir aftur.

Tað var tó Neistin, sum støðugt hevði størra yvirskotið. Hóast nakrir profilar vóru burtur hesaferð, so er breiddin á liðnum somikið stór, at hetta ikki nervaði tað heilt stóra. Strandingar eru hinvegin dekan ov tunnir í sínum spæli. Alt ov stór ábyrgd hvíldi á skjúttunum, og tá hesir ikki støðugt kunnu raka alt, sum skotið verður eftir, verður tungt hjá liðnum at vinna tað mista aftur.

Og tað var eisini ov lítið til at basa Neistanum, sum longu hevur annað beinið í FM-finaluni. Hinvegin er sera tættur dystur um næsta finaluplássið. Í løtuni er tað Kyndil, sum er ájavnt strandingum í tí dystinum, men trý onnur lið eru eisini, sum fegin vilja sleppa til orðanna tí viðvíkjandi.

### Fakta um dystin

**Neistin-StÍF30-25 (12-12)**
**10 min:** 5-2
**20 min:** 9-8
**40 min:** 19-16
**50 min:** 24-19
**Málskjúttar**
**Neistin:** Sjúður Thomassen 8, Davud Edvardsen 7, Finnur Hansson 5, Áki Mørk 4, Tróndur Kragesteen 4, Karl Oddmar Rasmussen 1

### Neistin-StÍF 33-27 (17-11):

# Bronsan tykist avgjørd

**Neistakvinnurnar vunnu tryggan sigur á StÍF, sum annars hevur líkst liðinum, sum kann hótt Neistan í bronsudystinum**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Bæði Neistin og StÍF hava stóran part av árinum verið í einum slag av ongamannalandi, har spenningurin um endaligu plaseringina ikki er tann heilt stóri.

StÍF hevði tó møguleika at skapa nakað av spenningi, um tær megnaðu at vinna á Neistanum sunnudagin, men tann møguleikin gjørdist ongan tíð serliga aktuellur.

Fyrsta góða korterið gekk hampuliga javnt á, men tá Neistin stutt undan steðginum fekk glið á sítt spæl, settu tær seg so ruddiliga á uppgerðina.

Eftir steðgin ráddi mest um at halda fast um leiðsluna, og tað eydnaðist eisini uttan stórvegis trupulleikar.

Sigurin ber við sær, at Neistin nú aftur er fýra stig framman fyri StÍF, og sum stigatalvan sær út í løtuni, so enda hesi bæði liðini trygt sum nummar trý og fýra. Niðurflytingarstríð verður ikki talan um, og munurin upp til oddaliðini er eisini ov stórur, og tí verður talan heldur ikki um nakran finaluspenning.

### Fakta um dystin

**Neistin-StÍF 33-27 (17-11)**
**10 min:** 4-3
**20 min:** 9-9
**40 min:** 23-17
**50 min:** 27-22
**Málskjúttar**
**Neistin:** Katrin á Neystabø 11(4), Lina Andriulyte 5, Unnur Danielsen 4, Anja Heinadóttir 3, Marjun F. Danberg 3, Rakul Augustinussen 3, Jacklin Durhuus 2, Birita Wardum 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 7(1), Fríðrun Danielsen 6, Adrianna Dobra 6(2), Bára Berthelsen 4, Anne Pedersen 2, Rósa Danielsen 1, Annika Petersen 1
**Brotskøst:** Neistin 5, StÍF 5
**Útvísingar:** Neistin 3, StÍF 2
**Dómarar:** Thomas J. Thomsen & Birgir Sondum.